KÍF-H71 24-28 (14-10):

Mistu á stokkinum

Annan heimadystin á rað viðførdu fleiri útvísingar innan stutt tíðarbil, at kollfirðingar mistu møguleikan fyri at fáa fulla úrtøku

HONDBÓLTUR – MENN
Jákup Mørk

Tá KÍF fyri góðari viku síðani mátti lúta fyri Neistanum, vóru kollfirðingar alt annað enn nøgdir um dómararnar. Fríggjadagin átti KÍF aftur heimavøll. Aftur hesa varð talan um tap, og heldur ikki hesa ferð tóktust teir á heimaliðnum at vera serliga væl nøgdur um avrikið hjá svørtu monnunum.

Útvísingar kostaðu

Tað var annars soleiðis fríggjadagin, at ígjøgnum nógv tann størsta partin av dystinum vóru tað kollfirðingar, sum vóru oman á móti favorittunum úr Hoyvík.

Serstakliga fyrstu løtuna høvdu gestirnir ilt við at koma ígongd, og hóast teir seinni fingu spælið at hanga betri saman, so var leingi líkt til, at tað skuldi gerast meira enn tungt at vinna seg inn aftur á vertirnar. Ikki fyrr enn seinasta korterið fingu hoyvíkingar otað seg framum, men tá stóð so púrasta fast hjá heimaliðnum afturfyri.

Innan tveir minuttir misnýttu teir fyrst eitt brotskast, fyri síðani at fáa tríggjar leikarar útvístar, og tá H71 so nýtti høvið til at toga seg fýra mál framum, var liðugt hjá KÍF.

Hanga í

Við sigrinum fekk H71 aftur fatur í heiðursmerkjarøðini, tó at liðið enn ikki hevur fingið fatur aftur á strandingum, sum í løtuni eru á hesum plássinum.

Hjá kollfirðingum merkti tapið hinvegin, at teir enn ikki eru heilt leysir úr botninum, har teir bert eru eitt stig framman fyri Kyndil, so enn er einki sum bendir á, at ári hjá kollfirðingum skal gerast stórt øðrvísi enn tað í fjør, tá liðið stóð seg væl í endaspælinum, men har eitt vánaligt grundspæl gjørdi góða várið virðisleyst, um tosast skal um heiðursmerki.

Dysturin í tølum

KíF-H71 24-28 (14-10)

Málskjúttar:
KÍF: Durica Tomic 9, Jákup Dam 6(1), Regin Petersen 4, Iljan Topic 3, Petur Martin Poulsen 1, Kristian Madsen 1

H71: Finnur Hansson 9(2), Halgir Dahl Olesen 6, Bjarni Wardum 3, Peter Rosbach 2, Johnny Durhuus 1, Anfinn N. Debes 1, Olaf Vestergaard 1

Brotskøst: KÍF 2, H71 3

Útvísingar: KÍF 8, H71 2

Dómarar úr Kyndli: Hannis Wardum & Uni Wardum.

Finnur Hansson hevur verið sera støðugur á máltalvuni í vetur, og aftur sunnudagin varð hann toppskjútti hjá H71

Mynd: Álvur Haraldsen

Neyvan til Jordan

Umvegis heimasíðuna hjá KÍ sigur Tomislav Sivic, at tað neyvan verður í Jordan, at hann fer at starvast sum venjari komandi árini

UTTANLANDS
Jákup Mørk

Stóru tíðindini í vikuskiftisblað okkara vóru, at Tomislav Sivic skuldi verða landsliðsvenjari í Jordan, men nú er tó líkt til, at hetta ikki er heilt rætt.

Á heimasíðuni hjá seinasta felag sínum, KÍ, letur Tomislav Sivic heilsa, og viðmerkir annars, at tað enn er so langt ífrá víst, at hann verður venjari í Jordan.

Tíðindini á fleiri altjóða fótbólts-heimasíðum stava frá, at Tomislav hevur verið til samrøðu hjá fótbóltssambandinum í Jordan, men tað hava 20 aðrir jugoslaviskir venjarar eisini verið.

Sivic er tó framvegis upp á tal, men enn er so eingin endalig avgerð tikin í hesum, verður sagt á heimasíðuni.

-jm

HB fingið styrk

Heimasíðan hjá HB skrivaði beint undan vikuskiftinum, at Tór-Ingar Akselsen hevur gjørt sáttmála við felagið til komandi ár.

Tór-Ingar er annars uppaldur í Vágoynni, har hann eisini hevur verið ein hin týdningarmesti leikarin hjá FS Vágum, sum nú noyðist tungu leiðina niður í aðru deild.

Júst niðurflytingin er sjálvandi høvuðsorsøkin til, at evnaríki miðvallarin hevur valt at skifta felag.

-jm

Arnold framvegis í B68

Á heimasíðu felagsins skrivar B68, at Arnol Joensen eisini komandi ár fer at verða ein partur av liðnum hjá bronsuvinnarunum.

Arnold kom undan kappingini í ár úr KÍ, har hann annars altíð hevur leikt, og eftir at hava verið nýttur ymsa staðni á vøllinum, vann kviki leikarin sær at enda fast pláss í tofta-álopinum, har hann so aftur verður at síggja komandi ár.

-jm

Máltindarnir

Kvinnur:

Simona Dziugyte	Stjørnan	83	(24)
Gabriella Fekete	VB	79	(20)
Asta Petrauskine	Sóljan	67	(7)
Lotte Sørensen	Kyndil	47	(16)
Ioana Rápa	VÍF	43	(9)
Katrin á Neystabø	Neistin	39	(19)
Anna K. Samson	Stjørnan	37	
Birita Wardum	Neistin	34	(2)
Andrijana Milodanovic	Stjørnan	31	(3)
Joan M. Joensen	Stjørnan	30	
Nicoleta Radu	VÍF	30	
Ileana Manulescu	StÍF	29	(2)
Regina Radó	VB	29	(4)
Súnfríð B. Jacobsen	StÍF	28	(12)
Annika Ljósstein	Kyndil	27	(7)

Menn:

Finnur Hansson	H71	48	(15)
Ingi Olsen	VÍF	42	(6)
Jacob Jónsson	Neistin	40	(5)
Høgni Klein	Kyndil	39	(2)
Halgir Dahl Olesen	H71	39	(6)
Sámal Joensen	VÍF	38	(6)
Heini Joensen	Neistin	38	(10)
Costin Dumitrescu	StÍF	38	(11)
Bjarni Wardum	H71	38	(12)
Dragisa Stojovic	Tjaldur	37	
Mortan Hansen	Tjaldur	36	(2)
Jónleif Sólsker	Kyndil	33	(14)
Dorica Tomic	KÍF	32	(5)
Iljan Topic	KÍF	27	
Sverri Justinussen	Tjaldur	27	(5)

Støðan 1. Deild kvinnur

	dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1 VÍF	6	6	-	0	-	0	185	110	75	12
2 Stjørnan	7	6	-	0	-	1	205	155	50	12
3 Neistin	6	4	-	0	-	2	145	123	22	8
4 VB	7	4	-	0	-	3	178	166	12	8
5 Kyndil	7	1	-	0	-	6	162	205	-43	2
6 StÍF	6	1	-	0	-	5	109	166	-57	2
7 Sóljan	7	1	-	0	-	6	147	206	-59	2

Støðan 1. Deild menn

	dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1 VÍF	6	5	-	1	-	0	179	140	39	11
2 Neistin	6	5	-	1	-	0	167	151	16	11
3 H71	7	4	-	0	-	3	190	189	1	8
4 StÍF	6	3	-	0	-	3	159	156	3	6
5 Tjaldur	7	2	-	1	-	4	165	176	-11	5
6 KÍF	7	1	-	1	-	5	171	198	-27	3
7 Kyndil	7	1	-	0	-	6	161	182	-21	2

| | | |